TELDUSÍÐAN

Spælið áðrenn dystin

Championship Manager 2 er eitt strategispæl fyri fótbóltsáhugað. Spælið snýr seg um at keypa røttu spælararnar, seta liðini og leggja rætta taktikkin

TEKSTMASKINAN

Championship Manager 2 Scandinavien Leagues er eitt øðrvísi spæl. Tað er ikki eitt vanligt fótbóltsspæl, har tú stýrir øðrunum liðunum á vøllinum. Spælið fer harafturímóti fram á grasinum, við venjara og managara. Tað er meira eitt strategispæl enn eitt eitt stríðsspæl.

Liðini verða sett

Championship Manager 2 er ein rød av spølum um tey evropisku fótbóltsdeildirnar, har donsku, norsku og svensku kappingarnar nú standa fyri tørni.

Í spælinum er tú venjari, og byrjað verður við at velja tað felagið, tú vilt venja. Síðani fytligir tú liði tínum gjøgnum allar dystirnar, bæði í heimligu og altjóða kappingum. So er spurningurin, um tú klárar teg betur, enn veruligi venjarin hjá liðnum.

Fyrst og fremst snýr spælið seg um, hvørt tú megnar at gera bestu liðuppstillingina til hvønn dyst. Hetta eru tey røttu liðini við teimum røttu spælarunum. Hvør spælari hevur sína egnu skíggjamynd, við formkurvum, tøkniligari góðsku og talentum, leiktum dystum, skaðum o. s. fr.

Tá tú setur liðið, snýr tað seg um at kenna spælararnar og seta plássini við rætta fólkinum. Og hvør dystur hevur jú ymsar mótstøðumenn, so tað snýr seg alla tíðina um at finna teir leikarar, ið mest hóska tilhitt liðið. Tað er ikki altið eins lætt.

Stuttir dystir

Tað er tíðin innan dysturnar, ið setir krøv til tíni taktisku evni og strategiska yvirlit. Sjálvir dysturnir vara bert fáar minuttir. Teir fara bara yvir skíggjan sum stuttar fráboðanir um, hvat hendi í dystinum.

Niðast á síggjanum kann tú fylgja við í, hvat lið hevur havt bóltin longst teir síðstu fimm minuttirnar, og soleiðis síggja, hvør hevur yvirvágna í spælinum.

Er taktikkurin púra skeivur, ber til at broyta hann í hálvleikinum - kanska við at skifta út leikarar.

Til viðhaldsfólk

Hetta er eitt spæl fyri fótbóltsáhugað - »bótbóltsfans«. Tað er sera skemtiligt at spæla venjari eina løtu, men rættuliga bitin verður tú av spælinum, um tú veitst nakað um fótbólt og kennir teir einstøku spælararnar og liðini og fylgir við í teimum rættuligu kappingunum.

Men hinvegin er hetta ein sera spennandi háttu at læra nakað um bæði spælarar og um taktikkin í fótbóltsheiminum.

Fakta

Championship Manager 2 Scandinavien Leagues krevur 486/SX við 8 mb ram, VESA-kompatibult SuperVGA grafikkort og CD-rom. Ein skjótari maskina hevur tó fyrimunir. Prísurin er 399 krónur og um nærmasta forhandlara fæst at vita frá Entertainment Shop á tlf 0 89 44 22 33.



Hvør leikari hevur sítt generalieblað við sínum serligu talentum og fysisku kondition. Hetta krevur serliga gransking av upplýsingunum um allar leikararnar, um tú skalt finna rætta leikara til rætta dystin



Championship Manager 2 Scandinavien Leagues krevuyr 486/SX við 8 mb ram, VESA-kompatibult SuperVGA grafikkort og SC-rom. Ein skjótari maskin hevur tó fyrimunir. Prísurin er 399 krónur og tú fært at vita um nærmasta forhandlara frá Entertainment Shop á telefon 0 89 44 22 33

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr.
P/f 81, **P/f Hvalnes, 100 Tórshavn**

Viðtøkur broyttar:
04.07.1996

Nevnd:
Farin frá sum formaður: Eiler Jacobsen, 100 Tórshavn
Farin frá sum næstformaður: Sámal Jacobsen, 100 Tórshavn
Innkomin sum formaður: Sámal Jacobsen, Smærugøta 9a, 100 Tórshavn
Innkomin sum næstformaður: Hjørdis Anna Maria Háberg, Støðlagøta 1, 160 Argir

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Hjørdis Anna Maria Háberg, Støðlagøta 1, 160 Argir
Innkomin sum stjóri: Eiler Jacobsen, Marknagilsvegur 19, 100 Tórshavn

Tekningarreglur:
Felagið verður bundið við undirskrift av formanninum saman við einum av hinum nevndarlimunum ella av felagsins stjóra

Skráseting Føroya
tann 13. november 1996

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/f 1414, **P/f Petur Hammer, 800 Tvøroyri**

Viðtøkur broyttar:
22.10.1996

Nýtt navn:
Sp/f Petur Hammer

Kapitalur:
Hækking við kr. 70.000,00 til kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kr. 70.000,00 við grunshækking

Nevnd:
Farin úr nevndini: Peter Don Vest Hammer, 800 Tvøroyri (formaður), Maureen Peterea Juul Hammer, 800 Tvøroyri og Finn Juel Thomsen, 800 Tvøroyri

Stjórn:
Innkomin sum stjóri: Maureen Peterea Juul Hammer, 800 Tvøroyri

Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av einum stjóra

Skráseting Føroya
tann 26. november 1996

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/f 1279, **P/f Heiðabúðin, 600 Saltangará**

Viðtøkur broyttar:
22.10.1996

Nýtt navn:
Sp/f Heiðabúðin

Nevnd:
Farin úr nevndini: Magni Olsen, 600 Saltangará og Olivar Johannesen, 727 Arnafjørður
Innkomin í nevndina: Nelly P. Olsen, 600 Saltangará

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Johan Peter Daniel Johannes Olsen, 600 Saltangará
Innkomin sum stjóri: Jakoba Kathrina Poulsen, 650 Toftir

Tekningarreglur:
Felagið verður bundið av stjóranum ella av tveimum nevndarlimum

Endamál:
Endamál felagsins er at reka allan handil

Skráseting Føroya
tann 26. november 1996

Kristin Balle

Anti-Virus

McAfee - heimsins stórsti framleiðari av antivirusforritum, hevur júst røttu og bestu forritini til at verja tygara dáta móti skaðiligum telduvirusum.

VIRUSSCAN™ - Finnur og burturbeinir kend og nýggj telduvirus á disklum, fløgum, harðdiskum og liknandi dátagoymslum. VirusScan fæst til DOS, Windows, OS/2, Machintosh og UNIX.

WEBSCAN™ - Kannar forrit og dáta, ið verða móttikin um internetið. WebScan virkar saman við NetScape, MS-Explorer og fleiri øðrum internet forritum.

NETSHIELD™ - Verður lagt á net-servaran og kannar øll dáta og forrit, ið verða goymd ella lisin á servaranum. NetShield fæst til Novell NetWare og Windows NT-server.

WEBSHIELD™ - Ein sokallaður "Firewall", ið verjir Web-servaran móti telduvirusum.

BOOTSHIELD™ - Verjir móti bootvirusum við at kanna bootsectorin tá teldan startar.

ROMSHIELD™ - Er ein bootprommur, ið verður settur á netkortið. RomShield kannar bootsectorin fyri telduvirus áðrenn stýriskipanin verður innlisin.

MCAFEE

690 Oyndarfjørður tlf. 44872
fax 44873 e-post mcafee@olivant.fo